**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0636**
**Tíðarskeið 17/05-24/05-2006**

---

**Fólk frá FRS.:** Bogi Hansen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum og at taka streymmátara upp á teimum føstu støðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og útgerð at taka fortoyningar upp við.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 18/5 kl.2400. Siglt varð suður í Hetlandsrennuna, har vit byrjaðu at taka streymmátara upp. Fyrst NWSB og so NWSC, tær komu báðar upp í øllum góðum. Haðani sigldu vit eystur á endan á skurði S, og tóku hendan skurðin móti Munkagrunninum.
Av Munkagrunninum sigldu vit vestur í Bankarennuna, har vit skuldu taka tveir streymmátara upp, men av tí at vindurin var nógv vaksin, og veðurvánirnar ikki vóru serliga góðar, varð ikki hildið at tað var ráðiligt at taka mátararnar upp, fyrr enn veðrið batnaði. Vit sigldu tí inn undir land og løgdu okkum undir Svínoynna at bíða eftir betri veðri. Tá vit høvdu ligið har í hálvtannað døgn, var vindurin nakað minkaður, so vit sigldu norður til NWNG og tóku fyrst hann upp og so NWNB. Hetta gekst væl, hóast líkindini ikki vóru av teimum bestu.
Líkindi vóru tó ikki til at taka rammurnar upp, so vit lógu og bíðaðu til dagin eftir, tá var veðrið gott. Vit tóku so rammurnar upp, fyrst NWNE og so NWNA, tær komu upp og vórðu tiknar inn í øllum góðum.
Siglt varð so vestur á Íslandsryggin, til rammuna IFRA, vit royndu at fáa hana upp, men tað eydnaðist ikki. Vit royndu so at dreggja, men hetta segði tað sama, vit fingu ikki rammuna upp.
Tá var so nógv liðið av túrinum, at vit máttu fara suður í Bankarennuna eftir mátarunum, sum vit høvdu liggjandi har, NWFC og NWFB, teir fingu vit upp í øllum góðum.
Siglt varð so á Havnina.
Vit vóru aftur á Havnini mikudagin 24/5 kl. 1000.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 14 støðir og saltprøvar á 14. Við WP2 glúpinum tóku vit eisini 14 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir eru analyseraðir.

**Viðmerkingar:**

12-09-2006 ________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 0636